ALV-merki mánadagin

SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

Nr. 31
LEYGARDAGIN
23. APRÍL 1966
39. ÁRG.

Eins fiskapris

JAVNAÐARFLOKKURIN HEVUR LAGT Á TING UPPSKOT UM ÚTRÓÐRARSTUDNING TIL FISKIMENN Á BYGDUM, HAR FISKURIN MÁ FLYTAST TIL AÐRA BYGD AT AVREIÐAST

Hetta uppskot varð lagt fyri tingið 18. apríl, og í viðmerkingunum til málið heldur flokkurin fram, at útróðramaðurin á bygd eigur at fáa sama fiskapris sum útróðramaðurin á teimum stóru plássunum við teimum størru førunum og í mongum lutum betri róðralikindunum. Fyri at halda fólkinum á heimstaði sínum, tí tað fólkaliga og landshúsarhaldsliga hevur stóran týdning, er tað neyðugt at gera tað so vinnuligt høgligt og handugt at liva í bygd síni, at fyrimunirnir fyri tann einstaka at flyta til stórplássini skulu verða minst møguligir. Uppskotið um eykastudning til útróðramenninar á bygd, so teir fáa sama fiskaprísin sum menn á stórplássunum, miðar ímóti hesum rættvísa máli.

Vil Ulbricht sameining?

Í tveir stívar tímar talaði eysturtýski kommunistaleiðarin Walter Ulbricht á 20 ára degjum síðan eysturtýska fólkarepublikkin varð stovnað. Í taluni tosaði Ulbricht um sameining Týsklands. Men fyri at sameiningi kundi fremjast helt hann tað verða avgerandi, at Vesturtýskland broytti stoðu sína munandi. Bæði stjórnarliga og vinnuliga.

Hornblástrarstevna

Leygardagin tann 30. apríl fer sjáldsom hending fram í Vestmanna; 6 hornorkestur hittast á fyrsta sinni til musikkstevnu, ikki fyri at kappast og konkurrera við hvonn annan, men fyri at stimbra felogini, gera arbeiði í teimum meira livandi og vekja ans fyri musikki.

Byrjað verður kl. 3 við skrúðgongu og hornblástri eftir vegnum móti nýggja skúla, allir 130 blásararnir eru við í skrúðgonguni, í skúlagarðinum fer so stevnan fram, um tað regnar, verður blást inni í fimleikarhøllini. Orkestrini byrja við samanblástri og enda við samanblástri; annars blása tey einsæris í 20-30 minuttir í hesari raðfylgju, ordna eftir aldri, burtursæð frá vestmenningum, ið eru vertir:

EYSTUROYAR JAVNAÐARFELAG

hevur veitslu í losjuni í Gøtu í kvøld kl. 8.
Øll javnaðaráhuga fólk eru vælkomin.

Vestmanna ljómlistafelag,
Nes sóknar musikkfelag,
Sørvágs tónleikarafelag,
Klakksvíkir hornorkestur,
G. H. M.
Havnar hornkestur.

Fyri stevnunevndina

Leif Nolsoe.

Nato-vegur verður yvirtikin

Løgmaður er komin aftur av ferð í Danmark. Og úrslitið er, at landið skal yvirtaka NATO-vegin, sum nú liggur í órokt.

Staturin vil læta 3 miljónur kr. til at seta vegin í stand, t.v.s. 8 km. av Oyggjarvegnum, meðan 200.000 krónur verða latnar til at halda vegin við. Tilsøgnin er tó treytað av, at peningajáttanin verður samtykt av dønum.

Bæði russar og amerikanarar eru samdir um at biðja aðalskrivaran í S.T. UThant um at halda áfram í starvi sínum, tá skeiðið er úti í november. U Thant hevur sagt, at hann skal geva svar í juni mánaða.

ALV merkir

verða seld mánadagin flaggdagin. Vit eiga at stýðja hetta tiltak, sum nú í 10 ár hevur verið til stórt gagn hjá teimum, sum hava verið heilsubrekað.

STYÐJIÐ MERKJASØLUNA

KEYPIÐ ALV MERKI!

Dagrenovation 1. apríl 1967 og forbrenningsstød

FRELSUNNARHERURIN HEVUR FINGIÐ KR. 10.000 TIL NÝGGJ INSTRUMENTIR

Býráðsfundur hóskvøldið 21. apríl 1966. Allir limir á fundi. 18 mál á skránni.

TILRÁÐINGAR FRÁ KASSANEVNDINI

Umsóknir frá:

a) Havnar Svimjifelag um loyvi at skipa fyri svimjuvenjingum í Gundadalshylinum sunnudagar og mikukvøldar. Eisini skulu teir skipa fyri kapp svimjing ein sunnudag í juni og í september umframt á ólavsøku. Samtykt.

b) Heedgaard Haraldsen um endurnýggjan av restauratiónsloyvi fyri 1966. Sent fútanum við býráðsins viðmæli.

c) Thomasiu Ørvarodd um restauratiónsloyvi fyri 1966 (Iris við Landavegin) selja mat, øl og sodavatn (tó bert øl saman við matinum.) Sent fútanum við býráðsins viðmæli.

d) Norrøna felagnum viðv. veitslu fyri luttakarum í norrøn ari stevnu í summar. 200 gestir eru væntandi og býráðið verður biðið saman við landsstýrinum um at geva ein døgurða. Játtað.

e) D. J. Jespersen um kioskloyvi. (Maðurin total invalid). Játtað.

TILRÁÐINGAR FRÁ TEKNISKU NEVNDINI

Umsóknir frá:

a) Arna F. Petersen um autorisatión sum vatnmeistari í Havn. Játtað, men Mortan Carlson upplýsti í hesum sambandi at ætlanin er at broyta reglugerðina fyri hetta.

b) Poul Poulsen o. fl. um asfalteran av vegi síðuvegur millum Tróndargøtu og Tvørgøtu.) Samtykt at gera hetta skjótast gjørligt.

(Framhald á 7. síðu)

Brúgv um Hvannasund

LØGTINGSMAÐUR P. J. OLSEN HEVUR VEGNA JAVNAÐARFLOKKIN LAGT FRAM UPPSKOT UM AT GERA KOSTNAÐARÆTLAN OG UPPDRÁTT YVIR BRÚGV UM HVANNASUND

Nú fjallaholini í Norðoyum skjótt verða liðug og tað verður koyrandi frá Klakksvík til Norðdepli er ein partur av vegsambandinum í Norðoyggjunum loystur.

Men Klakksvíkingar og menn eystan Múla vildi fegnir sæð, at vegamálið nú varð víðari fort, so tað kann verða koyrandi frá Klakksvík til Hvannasund og Viðareiðis. Fyri at hetta kann verða, má gerast brúgv yvir Hvannasund.

Flokksleiðsla javnaðarflokksins

Á landsfundi javnaðarflokksins vórðu hesir valdir í flokksleiðsluna:

P. M. Dam, formaður
Einar Waag, næstformaður
Villi Sørensen, skrivari
Arni Samuelsen, Klakksvík
Sámal P. Hansen, Norðagøta
Jørgen Thomsen, Skála
Hjalmar Didriksen, Vestm.
Frits Jacobsen, Sørvágur
J. P. Henriksen, Tórshavn
Robert M. Poulsen, Tórsh.
Drangberg, Skopun
Reynhold Sílá, Tvøroyri
Erling Poulsen, Vágur
Oliver Schrøter, Hvalba
D. J. Kjærbo, Fuglafirði

Aftrat hesum eru tingmenn flokksins limir í flokksleiðsluni.

BLAÐNEVND SOSIALSINS

Jona Henriksen, skrivstovukvinna, Tórshavn. Tórur Dalsgaard, skrivstovustjóri, Tórshavn. H. J. Jacobsen, búnaðarráðgevari, Tórshavn

Roknskaparførari flokksins og blaðsins er Martin Joensen, arbeiðsmannafelagsformaður Tórshavn.

TÁ KRØNPRINSURIN kom á Havnina í gjár fyrrapartin, gekk so illa at sleppa at bryggju, at hann vendi út aftur og varð liggjandi á fjørðinum til Tjaldrið varð farið seinrapartin. Prinsurin tók tvær reisur í botn á Tinganesi. Kavari fór at hyggja eftir, tá teir komu at bryggju.

SU

Sosialistiskt ungmannafelag

hevur felagsfund mánakvøldið 25. apríl kl. 19.30 í losjuhúsunum.

Evni:

1. *Frá landsfundinum.* (Haldor Hansen)
2. *Filmur úr Afrika 1961.*
3. *Ymiskt.*

Kaffi fæst.

Nevndin.

Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.
Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll slog av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ
v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

HUGSA TYGUM UM AT FERÐAST
– TOSIÐ FYRST VIÐ

faroe airways

SØRVÁGUR 103